# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 23.05.2024 |
| Mál nr.: | 24/06920-13 |
| Málsviðgjørt: | BL |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**umsiting av PKU-kortskránni**

Við heimild í § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2022 verður ásett:

**§ 1.** Heilsustýrið skipar, umsitur og mennir PKU-kortskránna.

**§ 2.** Við eina PKU-roynd, ella eina hælroynd, er at skilja: ein kanning, sum verður bjóðað øllum nýføðingum, fyri at kanna, um nýføðingurin hevur nakrar ávísar sjúkur, eitt nú Følling sjúkuna.
*Stk. 2.* PKU-royndirnar verða goymdar í PKU-kortskránni hjá Heilsustýrinum.

**§ 3.** Landsstýrisfólkið velur eina nevnd, sum skal taka avgerð um, hvørt ein granskingarverkætlan kann fáa loyvi at granska í PKU-kortskránni.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið velur fýra limir í nevndina. Hesir eru: tvey umboð fyri Heilsustýrið, undir hesum stjórin í Heilsustýrinum; varastjórin við læknafakligari bakgrund innan Sjúkrahúsverkið og eitt umboð fyri Heilsugranskingareindina innan Sjúkrahúsverkið við granskingarkunnleika og – royndum.
*Stk. 3.* Stjórin í Heilsustýrinum er forfólk í nevndini.
*Stk. 4.* Miðað verður ímóti, at umboðini í nevndini eru av báðum kynum, sbr. § 8 í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.
*Stk. 5.* Nevndin verður tilnevnd fjórða hvørt ár. Limirnir í nevndini verða sitandi, til nýggjir limir eru tilnevndir.

**§ 4.** Umsóknir um loyvi til gransking í PKU-kortskránni verða sendar til Fólkaheilsustýrið.
*Stk. 2.* Áðrenn loyvi verður givið til gransking í PKU-kortskránni, skal Vísindasiðseminevndin hava góðkent granskingarverkætlanina.

**§ 5.** Fyri at fáa atgongd til gransking í PKU-kortskránni, skal ein granskingarverkætlan verða mett at hava

munandi samfelagsligum týdning, umframt at koma við einum týðandi íkasti til føroyska heilsugransking, sum kann koma føroyska fólkinum til gagns. PKU-kortini skulu harumframt vera mett at vera neyðug fyri at kunna uppfylla endamálið við verkætlanini.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, xxx

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig